

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 10 - 2011

# Oljugrunnurin skal kanska bjarga evruni

Tað verður sagt, at norðmenn í Bruxelles plaga at skemta við, at kanska skuldi tann norski oljugrunnurin hjálpt ES burtur úr fíggjarkreppuni, sum samveldið er í. Nú bendir okkurt á, at skemtið kanska verður til álvara. Í hvussu er heldur svenski forsætisráðharrin, at pengarnir í norska oljugrunninum eru áhugaverdir. -Bæði tann norski oljugrunnurin og pengarnir hjá kinesarunum hava áhuga, tá tosað verður um, hvør hevur evni til at hjálpa Evropa burtur úr skuldarkreppuni, sigur Fredrik Reinfeldt sambært norsku tíðindastovuni NTB. Hann váttar, at pengarnir í norska oljugrunninum eru nevndir í hesum viðfangi. ES-leiðararnir hava tingast um at økja kreppugrunnin hjá samveldinum. Í løtuni eru 440 milliardir evrur í honum. Til samanberingar kann nevnast, at 388 milliardir evrur eru í norska oljugrunninum.